

www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 12 - 2012

# Oljunorra er best - aftur nú

Ein nýggj frágreiðing hjá World Economic Forum (WEF) vísir, at tá tað snýr seg um sambandið millum búskaparliga menning, atgongd til orku og burðardygd, liggur Noreg á fremsta plássi. Á teimum næstu plássunum koma Svøríki, Finnland og Sveis. Einki av OPEC-londunum er millum tey 50 ovastu, og USA er nummar 55 á listanum. -Tað er hugaligt, at Noreg er á odda. Frágreiðingin hjá WEF sigur, at tað er neyðugt við einum almennum kjaki um orkupolitikk, og at kjakið skal byggja á veruleikan. Heimurin hevur tørv á meiri orku, og Noreg er ein av teimum stóru veitarunum - ikki bara við okkara tilfeingi, men eisini við okkara máta at umsita tað, sigur ein væl nøgdur olju- og orkumálaráðharri, Ola Borten Moe, í tíðindaskrivi. Sambært altjóða orkustovninum, IEA, hevur tað ongantíð verið so neyðugt sum nú at útvega heimsins fólki atgongd til reina og burðardygga orku. 1,3 milliard fólk hava framvegis ikki atgongd til elektriskan streym. Orka fyritreyt fyri vøkstri Tá World Economic Forum ger sína meting av teimum einstøku londunum, hyggur stovnurin at styrki og veikleikum í orkuskipanini sum partur av heildini. Í teirri nýggju frágreiðingini vísir WEF á, at fleiri lond, sum hava góðan vøkstur í búskapinum, hava ilt við at tryggja eina burðatdygga menning, og at tann støðugt veksandi eftirspurningurin eftir orku ger tað trupult at røkka málinum um at skerja CO2-útlátið. -Tað er ein sannroynd, at heiminum tørvar orku fyri at skapa vøkstur, at skerja fátækradømið og at bøta um livikorini hjá fleiri milliardum heimsborgarum. Olja og gass verða ein týðandi partur av orkumynstrinum tey næstu nógvu árini, men vit mugu eisini leggja okkum eftir at menna ta varandi orkuna og at brúka orkuna á ein so skilagóðan hátt, sum til ber. Og so er tað ein moralskur spurningur at skerja útlátið, samstundis sum eftirspurningurin veksur. Vit kunnu ikki velja hetta ella hatta, men noyðast at loysa báðar trupulleikarnar ísenn, sigur Ola Borten